# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## »Har pengarnir fólkið flyta...«

Soleiðis yrkti Hanus Kamban til Kára P. fyri góðum tríati árum síðani, tá LP plátan »Vælferðarvísur« kom út. Tað var sangurin um flyting, har hin láglønti løntakarin av bygd noyddist til Havnar at arbeiða fyri at vinna sær dagligt breyð – og varð noyddur at selja sær »húsini har norðuri í líð« til »onkran, sum nú eigur tvey...«

Hvørt mansbarn man kenna hesar strofur hjá Hanusi, sum eru vorðnar fólkaogn – og tær verða ikki minni aktuellar, um vit lesa tíðargreinina hjá Jógvani Mørkøre í blaðnum í dag. Jógvan Mørkøre hevur sum fáur fylgt politisku skipanini í eitt mannaminni, og tí eru hansara hugleiðingar í blaðnum í dag sera áhugaverdar. Hann rør framundir, at pengarnir hava fingið ovurstórt vald á, hvør verður valdur á Føroya Løgting.

Tað hendi ein broyting á løgtingsvalinum 30. januar 2002. Av einhvørjari orsøk fór tað at kosta nógvar pengar at stilla upp til fyrsta løgtingsvalið eftir systemskiftið í føroyskum politikki - fyrsta valið eftir fullveldislandsstýrið. Hetta skal tó ikki skiljast soleiðis, at fullveldisvongurin ella sambands/javnaðarvongurin hevur serliga ávirkan á hesi viðurskiftini, men sum eygleiðarar kunnu vit staðfesta, at tað brádliga til løgtingsvalið í 2002 bleiv rættilga kommersialiserað at stilla upp til løgtingsval.

Jógvan Mørkøre vísir í tíðargreinini á næstu síðu á, at hetta er vorðið serliga grelt eftir síðsta val, tá Føroyar á fyrsta sinni vóru eitt valdømi. Hann hevur tosað við tingfólk, sum hava brúkt úr 100.000 krónum og upp um hálvu milliónina fyri at verða afturvald. Hann setir eisini beinleiðis fram pástandin, at tað kann vera ein orsøk til, at val ikki longu er útskrivað, at tingfólk rætt og slætt ikki hava ráð til løgtingsval í ótíð – at íløgan skal í minsta lagi hava fýra ár fyri at forsvara seg.

Er støðan soleiðis, sum Jógvan Mørkøre lýsir hana, so hava vit ein sera álvasaman demokratiskan trupulleika.

Og fyri at venda aftur til Hanus Kamban, Kára P. og neyðars láglønta bygdamannin, sum noyddist at flyta til Havnar, fyri at klára seg:

*»Í húsunum tínum nú halda teir frí*
*okkurt akademiskt kommandittkompaní*
*so gott er at sleppa sær burtur úr bý*
*at hvíla og hvessa sær vitið*
*til næsta leikin í talvinum*
*har pengarnir fólkið flyta...«*

Soleiðis kann føroyskur politikkur eisini lýsast anno 2010...

**Sosialurin**

## Viðmerkingar til ætlan býráðsins um fútaforboð

**SKÚLASTÝRIÐ Í KOMMUNUSKÚLANUM**

Skúlastýrið hevur bert hoyrt um ætlaða fútaforboðið í fjølmiðlunum. So hóast vit av góðum grundum ikki vita annað enn tað, sagt verður í fjølmiðlunum, loyva vit okkum at koma við hesum viðmerkingum.

Orsøkin, til at skúlastýrið kærdi avgerðina um at flyta 10. flokk úr Kommunuskúlanum í Eysturskúlanum, er ikki sambært teimum lógum, sum eru galdandi, og tí er avgerðin eftir okkara tykki ólóglig í sær sjálvum. Tað, sum er hent í málinum, er, at Fiskivinnumálaráðið, sum er kærumyndugleiki í hesum málinum, hevur givið kæruni steðgandi virknað, og tað merkir tað, at tann avgerð, sum kommunan tók 17. des. 2009 fyribils er sett úr gildi.

Tað undrar í hesum sambandi, at eftir øllum at døma ávirkar hetta als ikki kommununa, sum ótarnað heldur fram við sínum fyrireikingum at stovna hetta nýggja tilboðið í Eysturskúlanum. Tí tykist ætlanin um at leggja fútabann ímóti Kommunuskúlanum sera løgin, her eingin broyting er farin fram, her verður bara bygt víðari á ta tilgongd, sum hevur verið støðugt ment við neyðugum dagføringum tey seinastu árini, og sum næmingar og foreldur higartil hava tikið væl undir við og verið glað fyri. Alt í MiðRás-leistinum er innanfyri galdandi fólkaskúlalóg, so sum lærugreina- og breytatilboðini, og gerandisdagsins siðvenju eru serskipanirnar við musikkskúlamiðnámi og parttíðarstarvi í vinnuni tvinnað við MiðRásina. Hetta eru skipanir, vit hava roynt í verki nøkur ár, við sera góðum úrsliti.

Tá avgerðin er sett úr gildi fyribils, so eru vit aftur í útgangspunktinum, og eingin broyting er farin fram í Kommunuskúlanum, sum tessvegna hevur rætt til at halda fast við tey tilboð, sum annars vóru ráðløgd. Kommunan hevur ikki loyvi til at avgera tað námsfrøðiliga innihaldið og skúlaskipanirnar einsamøll, men hevur lógarásetta skyldu at hoyra skúlastýrini í øllum slíkum málum. Og tað er ikki gjørt í hesum føri. Skúlastýrini vóru fyri nøkrum árum síðani samd um at royna eina skipan fyri 10. flokk sum sjálvstøðuga skúlaeind við serstøkum bygningi, bygdum til endamálið, í Marknagili, sjálvstøðugari leiðslu og lærarum, sum burturav skuldu arbeiða í hesum depli. Mentamálaráðið góðtók ikki hesa ætlan. Og ístaðin fyri at fara í skúlastýrini at tingast um nýggju støðuna, sum var íkomin, so tekur kommunan einvegis ta avgerð at flyta næmingarnar á annað stað, við øðrum leiðsluformi og aðrari læraraluttøku, enn tað skúlastýrini mæltu til. Og tað er hetta, skúlastýrið í Kommunuskúlanum hevur funnist at og fyribils fingið steðgandi virknað fyri, meðan kæran verður viðgjørd.

Kommunuskúlin hevur í løtuni nógv tað størstu 10. flokseindina í landinum og følir seg tí hava skyldu mótvegis næmingunum og foreldrunum at koma við einum tilboðið, MiðRás, til hendan aldursbólkin, sum vit hava lærarar, royndir og góða tøkniliga útgerð at taka ímóti. Vit loyva okkum bert at bjóða fram eitt virðiligt tilboð, sum vit í fleiri ár hava ment í samstarvi við myndugleikar, starvsfólk, foreldur og næmingar eins og fyriskrivað er í fólkaskúlalógini.

*Tórshavn 18. mars 2010*

## Hattin av fyri LÍV!

**HANS PAULI STRØM**
løgtingsmaður



Hvussu hava vit ikki í áravís tosað uppísamanaftur um fjølbroyttar og alternativar bústaðarmøguleikar, lutaíbúðir og leiguíbúðir?

Nú hevur LÍV sett trumfin á og leggur kapital á borðið.

Ongin ivi er um, at nógv standa klár at taka av, bæði fólk at fáa sær bústað á henda lagaliga og spennandi hátt, eins og handverkarar at smíða. Og eg veit um fleiri kommunur og feløg, sum bert bíða eftir at kunna sleppa ígongd. At byggja m.a. til ungdóm, til alternativar eldraíbúðir, til støk og til ungar familjur, til fólk við serligum tørvi, osv.

Men nú er landsstýrið forðingin – vit mangla neyðugu lógarkarmarnar, sum landsstýrið skal skapa.

Undirritaði legði lógaruppskotini um vanligar og serstakar lutaíbúðir, eins og um vardar íbúðir, fyri løgtingið á heystið 2007. Eftir góða móttøku komu tey tíverri ikki úr Trivnaðarnevndini, áðrenn val varð útskrivað, og duttu tí burtur.

Enn eru tey ikki komin aftur á tingborð. Tað er bæði undrunarvert og hugstoytandi.

Nú hevur LÍV so yvirhálað politiska myndugleikan. Tað skumpar undir at fáa lógaruppskotini framaftur.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.